FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Løgtingið**

**Tórshavn**, 13. september 2017

**Mál nr.:** 16/00255-10

**Málsviðgjørt:** JEK

**Løgtingsmál nr. xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum** (Stuðul til persónar við bústaðarskyldu)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum**
(Stuðul til persónar við bústaðarskyldu)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 21.apríl 1999, løgtingslóg nr. 45 frá 30. mars 2001, løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 171 frá 22. desember 2009, løgtingslóg nr. 49 frá 26. mai 2010, løgtingslóg nr. 172 frá 23. desember 2011, løgtingslóg nr. 33 frá 27. apríl 2012, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2012 og løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2013, verður henda broyting gjørd:

Í § 3 verður eftir stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4.* Persónur við bústaðarskyldu lýkir treytina í stk. 3, um egni bústaðurin ikki verður leigaður út."
Stk. 4 og 5 verður eftir hetta stk. 5 og 6.

**§ 2**

Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul. 1. Almennar viðmerkingar.**

**Endamál við broytingini**
Endamálið við hesari lógarbroyting er loyva, at rentustuðul verður latin persóni, sum hevur bústaðarskyldu.

**Galdandi reglur**
Sambært galdandi reglum, er tað ein fyritreyt fyri at fáa rentustuðul til egnan bústað, at lánið antin er avtalað áðrenn 18. januar 1991, ella at lánið er veitt fyri matrikulnummarið ávikavist bústaðareindina, har viðkomandi verður hildin at búgva.

Galdandi reglur loyva ikki, at rentustuðul verður veittur fyri hús og aðrar bústaðareindir hjá persónum við bústaðarskyldu, um lánið er avtalað 18, januar 1991 ella seinni.

Prestafelag Føroya hevur í fleiri umførum heitt á landsins myndugleikar um at bera so í bandi, at prestar í fólkakirkjuni við bústaðarskyldu verða undantiknir reglunum, ið siga, at prestar, ið eiga egin hús, men eru álagdir at búgva í prestagarði, ikki fáa rentustuðul.

Sum prestur við bústaðarskyldu er ein álagdur at búgva í prestagarðinum. Prestur, sum eigur egin hús, fær ikki rentustuðul, um hann ikki býr á hesum matrikli. Prestur rindar sum er mánaðarliga húsaleigu fyri prestagarðin umframt olju og ravmagn.

Bústaðarskyldan varð herd við lógini frá 2013 um størv og embæti í fólkakirkjuni. Tískil metir Prestafelag Føroya, at hetta kann tulkast sum, at bústaðarskyldan er eitt politiskt ynski.

Víst verður á, at prestur er noyddur til eisini at hugsa um egin hús, og hvar hann ella hon skal búgva, eftir at prestur er farin úr embæti. Harafturat kann familjan hjá presti verða noydd at flyta úr prestagarðinum við stuttum skotbrái, um prestur doyr. Mett verður ikki, at prestur skal verða noyddur at leiga egin hús út, ella eingi hús at eiga, fyri at fáa hetta til at kompensera fyri rentustuðulin.

Heitt verður tí á landsstýrið um at skipa so fyri, at rentustuðul eisini kann umfata hús hjá prestum við bústaðarskyldu.

Áheitanin frá Prestafelag Føroya hevur verið til hoyringar hjá TAKS.

TAKS vísir í hesum sambandi á, at tað eftir galdandi lóggávu er eitt krav fyri at fáa rentustuðul, at umsøkjarin býr í bústaðnum. Um farið verður burtur frá hesum útgangsstøði, tá talan er um prestar, mælir TAKS til, at hetta verður gjørt generelt, soleiðis at undantakið fevnir um øll við bústaðarskyldu.

**Hoyring:**

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá.

- Felagnum Peningastovnar
- Kommunufelagnum
- Bústøðum

- Føroya Bústaðarfelag
- Prestafelag Føroya v/Teodor Eli Dam Olsen, formanni
- TAKS

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.**
Uppskotið fær helst fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, men ikki ber tó til at seta tøl á, hvussu stórar hesar avleiðingar verða, tí tað veldst um, hvussu nógvir persónar og onnur við bústaðarskyldu velja at gera brúk av skipanini.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Uppskotið fær helst umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

**Avleiðingar fyri borgarar**
Uppskotið hevur við sær jaligar avleiðingar fyri persónar við bústaðarskyldu.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | Nei |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Ásetingin ber í sær, at persónar við bústaðarskyldu framyvir kunnu søkja um rentustuðul til egnan bústað, hóast teir ikki búgva í bústað. Hetta er tó treytað av, at umsøkjarin ikki leigar bústaðin út.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Hjáløgd fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur

Fíggjarmálaráðið, 13. september 2017

**Kristina Háfoss**
Landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason